ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Dagf.: 16. august 2024
Mál: 24/18305
Viðgjørt:

Nr. 52-007/2024

Fyrispurningur eftir tingskipanini § 52 a

Svar upp á skrivligan fyrispurning nr. 52-007/2024 eftir tingskipanini §52a til Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu í almanna- og mentamálum, frá Liljan Weihe, løgtingskvinnu, um Børn, ung og vaksin, sum Almannaverkið sendir av landinum

Spurningar:

1. Hvussu nógvir borgarar, sum koma undir ábyrgdarøkið hjá landsstýriskvinnuni, eru send av landinum seinastu 5 árini?
2. Hvussu nógv eru farin "sjálvboðið" á t.d. eftirskúla ella annan bústovn í Danmark?
3. Hvussu nógv hevur hetta kostað hesi 5 árini?
4. Hvussu tryggja vit okkum, at vit frameftir kunnu veita neyðugu viðgerð og hjálp í Føroyum við neyðugum samstarvi millum ábyrgdarøkini?

Svar til spurning 1 og 3.
Løgtingslóg um almannatrygd og tænastur

Í tíðarskeiðinum 2019 til 2023 hava 9 borgarar fingið pláss á bú- og viðgerðarstovni í Danmark sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur (forsorgarlógini áðrenn 2021). Sí talvuna niðanfyri.

Flutt í árinum

Ár	2019	2020	2021	2022	2023
Tal	2	2	3	0	2

Í sama tíðarskeiði hava samanlagt 10 borgarar verið á bú- og viðgerðarstovni í Danmark. Samlaði kostnaðurin er 48.347 tkr. Sí talvuna niðanfyri.

Samanlagt á bú- og viðgerðarstovni í Danmark*

Ár	2019	2020	2021	2022	2023
Tal	3	4	7	7	7
Landið rindar í tkr.	3.570	6.313	11.660	8.821	17.983

**Uppihaldið hjá hvørjum borgara gongur í flestu førum yvir um ár. Talvan vísir hvussu nógvir borgarar fáa tænastu í Danmark býtt yvir ár.*

Pr. 14 august 2024 eru 6 borgarar á bú- og viðgerðarstovni í Danmark sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.

Afturat hesum eru 5 eldri borgarar, sum hava varandi bútilboð í Danmark, og sum ikki eru við í hesi uppgerð. Hesir borgarar fóru niður til Danmarkar fyri nógvum árum síðan og hava ikki ynskt at komið heimaftur til Føroyar.

Svar til spurning 2 og 3.
Løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk

Í tíðarskeiðinum 2019 til 2023 hava 7 ungdómar sjálvbodnir fingið plass á ymiskum skúlum/háskúlum í Danmark. Samlaði. Sí talvuna niðanfyri.

Flutt í árinum

Ár	2019	2020	2021	2022	2023
Tal	1	0	1	4	1

Í sama tíðarskeiði hava 15 borgarar verið á ymiskum skúlum/háskúlum í Danmark. Samlaði kostnaðurin er 3.201 tkr. Sí talvuna niðanfyri.

Samanlagt í arbeiðsbúgving ella há-/skúla í Danmark*

Í arbeiðsbúgving/háskúla uttanlands	2019	2020	2021	2022	2023
Tal	7	1	2	5	5
Landið rindar í tkr.	848	523	107	704	1.019

**Uppihaldið hjá hvørjum borgara gongur í flestu førum yvir um ár. Talvan vísir hvussu nógvir borgarar fáa tænastu í Danmark býtt yvir ár.*

Pr. 14 august 2024 eru 3 borgarar á skúlum/háskúlum í Danmark sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.

Svar til spurning 4

Tað er eitt av aðalmálunum at veita hóskandi tilboð í Føroyum soleiðis, at vit ikki noyðast at veita tænastuna uttanlands.

Í mun til tilboð sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, er heimild í lógini til í serligum førum at veita borgarum, ið hava autismu ella somu eyðkenni og líknandi avbjóðingar í mun til útbúgving, sum tey, ið hava autismu, stuðul til førleikagevandi útbúgving uttanlands, um so er, at tað ikki finst hóskandi tilboð í Føroyum. Eisini er heimild í lógini til heilt ella lutvíst at veita fyriskipan til fólk við sjónbreki og hoyribreki í øðrum landi, um egnað fyriskipan ikki er í Føroyum.

Í mun til tilboð sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, er heimild í lógini at gera avtalu við veitara uttanlands, tá nøktandi tilboð ikki kann veitast í Føroyum.

Tá tænasta verður veitt uttanlands er ofta talan um slíkar avbjóðingar, ið krevja servitan og royndir, sum vit ikki hava í Føroyum. Sama avbjóðing sæst eisini í donskum kommunum, har

kommunurnar keypa spesialiseraða tænastu frá hvørjum øðrum og frá regiónunum. Hetta tí, at tað krevur eina ávísa mongd av borgarum fyri at uppbyggja og halda við líka tað høga fakliga og spesialiseraða støðið, ið krevst.

Síðan 2015 hevur Almannaverkið skipað 17 nýggj pláss á bú- og viðgerðarstovni í Føroyum sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, og hvørs endamál er at veita sosialnámsfrøðiliga viðgerð til borgarar við samansettum og kompleksum avbjóðingum og sum eisini kunnu hava dóm. Eisini er samstarv skipað millum bú- og viðgerðarstovnar og Psykiatriska depilin, ið er avgerandi fyri at kunna veita neyðugu tænastuna í Føroyum. Hesar fyriskipanir eru við til at minka um tørvin á tænastum uttanlands.

Ein ítøkilig avbjóðing, sum vit hava trupult við at loysa í Føroyum er, tá borgari hevur umfatandi rúsmisnýtslu og aðrar samansettar avbjóðingar. Almannaverkið metir, at eitt tvørfakligt viðgerðartilboð manglar til hendan málbólk í Føroyum. Umráðandi er at tænastan verður veitt samlað, har Almannaverkið veitir sosialnámsfrøðiliga viðgerð og har Heilsuverkið veitir psykiatriska viðgerð, avrúsing og rúsviðgerð.

Ein avbjóðing, tá talan er um rúsmisnýtslu, er at veita hesum borgarum tak yvir høvdið. Tað er umráðandi at halda rúsmisnýtsluni burtur frá øðrum borgarum í bútilboði hjá Almannaverkinum, tí kann hesin málbólkur ikki integrerast í verandi bútilboð hjá Almannaverkinum. Onnur avbjóðing er, ikki at savna ov nógvar borgarar við somu avbjóðingum á sama staði, soleiðis at hesi hava neiliga ávirkan á hvønn annan.

Hóast fleiri tilboð verða skipaði í Føroyum, kemst ikki undan, at einstakir borgarar hava ein tørv, ið krevur slíka spesialiseraða tænastu, at tænastan má keypa uttanlands.

Tórshavn, 16. august 2024

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna